


*Tað var heilt ótrúligt at síggja so nógv fólk. Eg eri himmalskt glað fyri, at tað vóru so nógv fólk, sum vístu ein áhuga fyri evninum, sigur Tórun Ellingsgaard, sum hevur skrivað bókina "Jana – eitt hjartabarn".*

# Ein søga, ið er verd at siga frá

**Tíðindakvinnan Tórun Ellingsgaard hevur skrivað bókina um Janu, sum kom út í gjár, hon heldur at tað hevur verið bæði spennandi og lærurík at skriva bókina**

Tórun Ellingsgaard hevur arbeitt við bókini um Janu síðan januar mánað í ár.

– Tað hevur verið sera spennandi og lærurikt at skriva hesa bókina, samstundis við at tað hevur verið strævið at skula kanna so nógv tilfar og gera so nógvar samrøður, sigur Tórun Ellingsgaard.

Hon heldur, tað var áhugavert at fáa innlit í, hvussu foreldrini tóku sær av Janu, eftir at tey høvdu funnið útav, at tey høvdu eitt fjølbrekað barn. Samstundis heldur hon, tað vera spennandi at fáa innlit í arbeiðið hjá Javna, har 70 fólk stovnaðu eitt felag, fyri í felag at kunna gera mun.

– Tað hevur verið serliga spennandi at fáa innlit í stríðið, ið skuldi til fyri at skapa menningartarnaðum livilig kor í Føroyum.

## Kannaði evnið væl

Tað var beiggi Janu, Óli Samró, sum síðsta vár ringdi til Tórun. Óli greiddi henni frá, at hann átti eina systur, sum var menningartarnað. Hann hevði leingi hugsað um, at onkur átti at fortalt søguna hjá henni, og um tað stríðið, sum foreldrini upplivdu, fyri at hon kundi vera búgvandi í Føroyum.

– Mín fyrsti tanki, tá Óli ringdi til mín, og spurdi um eg vildi skriva ein bók um systir sína, var, at fólk oftast halda sína søgu vera spennandi. Tað er tó ikki víst, at søgan er spennandi fyri onnur at lesa.

Tá tað var ein úr familjuni, sum vendi sær til hennara, tók Tórun eitt víst fyrivarni. Hon setti seg væl inn í evnið og sá, at tað var ein søga, sum hon helt, var verd at siga frá.

– Man kann siga, at eg vildi ikki leggja navn til at skriva eina reypisøgu. Eg vildi vera vís í, at tað, sum kom burturúr var eitt ordiligt journalistiskt produkt. Tí setti eg meg inn í, um tað var grundarlag fyri tí, áðrenn eg játtaði at skriva bókina, greiðir Tórun Ellingsgaard frá.

## Ríkandi

Tórun hugsaði leingi um søguna. Tá hon var í Føroyum síðsta summar møtti hon Óla og foreldrunum, og um heystið gav hon teimum svar, at hon vildi skriva bókina.

Í januar byrjaði Tórun at arbeiða við bókini, og hon hevur sjálv fingið nógv burturúr arbeiðinum.

– Eg haldi, at tað er ríkandi fyri eina stund at síggja samfelagið ígjøgnum eyguni á nøkrum fólkum, sum hava so nógv øðrvísi umstøður og avbjóðingar enn ein sjálvur hevur. Tað setir nøkur ting í perspektiv. Man sær, at tað dagliga grenjið er petitessur í mun til tað, sum nógv onnur hava at stríðast við. Tað haldi eg er gott at vera mintur á.

Í sínum arbeiði vil Tórun Ellingsgaard fegin kasta ljós á evni, sum hon heldur hava týdning.

– Eg haldi at henda søgan hevur týdning, og eg vóni at hon eisini fer at hava týdning fyri lesaran, og at tað eisini kann vera ríkandi at lesa bókina, á sama hátt sum tað hevur verið ríkandi hjá mær at arbeiða við henni.





*Foreldrini Helena og Hanus Samuelsen saman við dóttrini Janu Samuelsen.*

# Bókin gevur vón

**Talan er um eina vakra bók, ið hevur eitt gott mál og sum kann geva fólki í líknandi støðu vón um, at tað ber til, heldur Karin Kjølbro**

Millum tey mongu fólkini, ið vóru savnaði í Miðlahúsinum í gjár til útgávuna av bókini, var Karin Kjølbro, leiðari á Kriminalforsorgini, og hon fegnast stórliga um útgávuna.

– Eg haldi talan er um eina vakra bók, og sum hevur eitt gott mál. Bókin er trúgv ímóti tí sum fór fram fyri nógvum árum síðani og lýsir tingini sum tey vóru, sigur Karin Kjølbro um "Jana – eitt hjartabarn".

– Somuleiðis er talan um eina vakra søgu um familjusamanhald og stuðul, og eg meti at hetta so avgjørt er ein týdningarmikil bók. Í nógv ár hava vit tikið so nógv á hesum økinum fyri givið, men soleiðis hevur veruleikin ikki verið og hóast mong halda, at umstøðurnar framvegis eru langt frá góðar, so er veruliga nógv hent, sigur Karin Kjølbro.

Spurd beinleiðis um, hvønn týdning Karin Kjølbro metir bókin kann fáa, er hon skjót at svara.

–"Jana – eitt hjartabarn" er ein bók, sum kann geva øðrum fólki, sum koma í eina líknandi støðu, vón um at tað ber til. Familjan hevur lívskvalitet og tað er flott, vísir Karin Kjølbro á.

# Øll kunnu læra úr bókini

**Diana og Finn í Puntabyrgi eru foreldur at tveimum brekaðum børnum, og hava bæði verið ógvuliga virkin í Javna. Tá vit fingu orðið á Finn sjálvan um spurdu hann um bókina, so segði fegnast um útgávuna**

– Eg eri ógvuliga fegin um, at henda bókin kemur út, og hetta er ógvuliga positivt fyri okkum, sum hava brekað børn, sigur Finn í Puntabyrgi, pápi at tveimum brekaðum børnum.

Finn í Puntabyrgi vísir eisini á, at bókin er av stórum týdningi, serliga fyri komandi ættarlið.

– Bókin er góð og týdningarmikil hjá nýggja ættarliðnum, tí hon lýsir tann øgiliga munin, sum er nú og hvussu tað var einaferð. Og her má eg so staðfesta, at tað altso til tað betra, at tingini er broytt til, sigur Finn í Puntabyrgi.

Hann vísir eisini á, at tað ikki bara eru bøttar umstøður, sum eru verdar at hefta seg við í søguni hjá teim brekaðu, men eisini er eitt nógv størri forstáilsi millum manna og politikarar fyri hesum bólki.

Finn í Puntabyrgi vil eisini gjarna rósa sjálvari bókini og fólkunum aftanfyri hana.

– Eg haldi at bókin er ómetaliga væl skrivað. Hon er løtt at lesa og fangar eisini væl, so tá tú fyrst ert byrjaðu, er tað sera ringt at sleppa henni. Øll kunnu lesa bókina og øll kunnu læra okkurt úr henni, sigur Finn í Puntabyrgi, sum ikki dylur yvir, at bókin í nógvar mátar er ein minni kollvelting.